**Váttan sambært sáttmálanum um starvsviðurskifti hjá sjófólki regla A 4.2.2 um lóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða**

Eitt og hvørt sjófólk, ið er sett at gera arbeiði á einum skipi undir føroyskum flaggi, er á jøvnum føti við persónar, ið eru settir at arbeiða í Føroyum og uttan mun til, um arbeiðið er í samband við raksturin hjá skipinum, fevnt av løgtingslógini um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða, um talan er um fylgjur av arbeiðsskaðum og vinnutreytaðum sjúkum. Føroya Vanlukkutryggingarráð tekur avgerðir eftir løgtingslóg um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða í málum viðvíkjandi arbeiðsskaðum og vinnusjúkum.

Eigarin av hesum skipi hevur skyldu til at tekna trygging í einum tryggingarfelagi fyri allar persónar, sum eru settir í starv at arbeiða umborð á føroyskt skrásettum skipum eftir skiparans ávísing, ið veitir fulna fyri krøv sambært løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða, um talan er um fylgjur av arbeiðsskaðum, og til at gjalda inn til Vinnusjúkugrunnin fyri at veita fulna fyri krøv orsakað av vinnutreytaðum sjúkum.

Skiparin á hesum skipi hevur skyldu til at skriva niður upplýsingar í dagbókina um møguligar arbeiðsskaðar ella vinnutreytaðar sjúkur og at boða frá vinnutreytaðum skaðum, soleiðis sum tað er ásett í løgtingslógini um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða.

Tá ein arbeiðsskaði tekur seg upp á einum skipi undir føroyskum flaggi, og arbeiðsgevarin ikki hevur teknað eina trygging, skulu tryggingarfeløgini, ið tekna arbeiðsskaðatrygging í Føroyum, rinda útreiðslurnar sambært § 21, stk. 1 í løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða.

Veitingar sambært lógini eru:

1) Endurgjald fyri mist vinnuføri.

2) Skaðabót fyri varandi mein.

3) Útreiðslur til heilivág, sjúkuviðgerð o.a. sum ikki verður dekkað av føroyskari heilsutrygd.

4) Skiftisveiting til eftirsitandi persónar, ið tann deyði hevur skyldu at forsyrgja.

5) Endurgjald fyri miss av uppihaldara.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Føroya Vanlukkutryggingarráð:


Føroya Vanlukkutryggingarráð

c/o Sorinskrivarin

C. Pløyensgøta 1

100 Tórshavn

E-Mail: fvr@sorinskrivarin.fo

Phone: +298 31 10 03